

*Oddmar Gudmundsson misti konuna Gudrun H. Joensen í flogvanlukkuni í Stord.*

**MYND:** JENS KRISTIAN VANG

TÁ ATLANTIC AIRWAYS **FLIGHT 670** FÓR ÚTAV BREYTINI Í **STORD**, SKAKAÐI TAÐ FØROYSKU TJÓÐINA. FLOGTERNAN **GUDRUN H. JOENSEN** ÚR SANDAVÁGI, VAR EIN AV TEIMUM FÝRA, SUM LÓTU LÍV Í VANLUKKUNI. NÚ NØKUR ÁR SEINNI HAVA VIT TOSAÐ VIÐ MANNIN HJÁ HENNI, **ODDMAR GUDMUNDSEN**, UM RÆÐULIGA DAGIN Í 2006 OG **LÍVIÐ** AFTANÁ STORD

**SAMRØÐA**

**Inna Törnroos**
inna@sosialurin.fo

Tað byrjar sum ein púra vanligur morgun – týsdagurin 10. oktober í 2006.

Oddmar Gudmundsson fer tíðliga upp, men hann letur teir báðar synirnar, 4 og 7 ár gamlar, sova eitt sindur longri. Hann hevur frí frá arbeiði hendan dagin, men skal koyra dreingirnar í barnagarð.

Konan, Guðrun, var farin til Danmarkar kvøldið fyri, tí hon skuldi næstu dagarnar flúgva sum flogterna hjá Atlantsflogi í Noregi.

Oddmar stákast heima og koyrir ikki útvarpið frá. Telefonin ringir, tað er eitt umboð fyri Atlantic Airways, ið greiður Oddmari frá, at tað er hent eitt óhapp við einum flogfari, og at nøkur fólk eru saknað.

Oddmar hugsar ikki, at Guðrun er í nøkrum vanda. Hann ringir til fartelefonina hjá henni, men fær einki svar.

Telefonin ringir aftur. Nú eru boðini, at Guðrun er ein av teimum saknaðu.

Hóast boðini er Oddmar enn róligur og bíðar í tolni. Ein vinmaður kemur framvið, og synirnir sova enn.

> **Eitt umboð fyri Atlantic Airways og ein politistur komu á gátt við ræðuligu boðunum**

Seinni koma eitt umboð fyri Atlantic Airways og ein politistur á gátt. Teir eru komnir við ræðuligum boðum.

Guðrun er deyð.

### Hittust sum tilkomin

Tað eru liðin trý og eitt hálvt ár, og Oddmar situr í hugnaliga køkinum í Sandavági. Páskagardinurnar eru uppi, og høsnarungapyntið er komið fram. Í einum horni í stóru stovuni er ein mynd av Guðrun í brúðarkjóla, og undir liðuni hongur heiðursdiplomið »Ársins Føroyingur«, ið varð handað henni posthumt.

Oddmar er júst komin frá arbeiði. Hann starvast hálva tíð sum húsavørður á Ellis- og røktarheiminum í Miðvági. Hann er útbúgvin elektrikari og snotuligu húsini, ið hann og synirnir búgva í, hevur hann sjálvur bygt.

Hann fór einsamallur í húsini í 1989. Guðruna hitti hann ikki fyrr enn í 1993. Tá vóru tey bæði tilkomin, hann 37 og hon 28 ár.

Hóast Guðrun var úr Bø og Oddmar úr Sandavági, hevði hann ongantíð sæð vøkru bíggjargentuna, fyrrenn eitt kvøldi í dansinum í Miðvági.

Tey komu saman, men stutt eftir gjørdist Oddmar sjúkur. Diagnosan var blóðkrabbamein. Hann fekk viðgerð bæði í Føroyum og í Danmark, og tað eydnaðist at basa sjúkuni.

1996 giftust hann og Guðrun. 1999 kom fyrsta barnið, Borgar, og trý ár seinni í 2002 kom Eigil.

Guðrun starvaðist sum flogterna og hevði gjørt tað í nógv ár, bæði hjá Mærsk og Atlantic. Henni dámdi væl arbeiðið, men longu túrarnir til Noregs royndi hon oftani at sleppa undan, tí tað var so leingi at verða burturi frá familjuni.

Áðrenn vanlukkuferðina í oktober 2006 hevði hon ikki verið í Noregi í langa tíð. Eisini hesuferð vóru tað flogternur, ið bjóðaðu seg fram at fara fyri hana. Men hon helt at nú mátti tað verða hennara túrur at fara.

### Fóru til Noregs

Oddmar hyggur út gjøgnum vindeygað. Hann greiðir stillisliga frá, hvussu hann minnist tímarnir eftir, at deyðsboðini vóru borðin. Hann vakti synirnar og koyrdi teir oman til dóttur beiggjan, har teir plaga at verða. Húsini fyltust við fólki, ið vildu vísa samkenslu. Eftir nakrar tímar komu synirnir heim og Oddmar møtti teimum í túninum og greiddi teimum frá hvat ið var hent. Teir gjørdust illir. Rasandi. Inná hvat, veit Oddmar ikki rættuliga, men illir vóru teir.

Tveir dagar seinni fóru Oddmar, synirnir, familjan hjá Guðrun og nøkur starvsfólk hjá Atlantic til Noregs. Tey lendu í Haugesund og ▸